# P-dagur í morgin

Nú vit nærkast ljósari tíðum, várið er í nánd, er Páskabryggið hjá Føroya Bjór bryggjað. Hin fyrsta páskabjórin sá dagsins ljós í 1982. Eins og undanfarin ár, verður serliga nógv gjørt burtur úr góðskuni og smakkinum á hesum bjóri. Bjórin er bert bryggjað í avmarkaðari nøgd. Páskabryggið er rav-gylt og hevur eina góða javnvág í søtleika og beiskleika. - Perfekt til páskahøgtíðina og páskaborið, og vit eru sera væl nøgd við ársins páskabryggj, siga tey av Føroya Bjór.



*Eitt tekin um, at várið er í nánd, er páskabryggið frá Føroya Bjór*



*Tað hevur tikið langa tíð hjá Crawling Blue at finna rætta ljóðið. Ikki færri enn fýra ljóðmenn hava verið inni í myndini.
- Men nú ljóðar fløgan, sum vit vilja hava hana at ljóða. Tað ljóðar pissifeitt. Tað ljóðar av Crawling Blue, sigur Uni R. Debess, sangari.*
*Mynd: Høgni Egholm Rasmussen*

Yngsti limurin í Crawling Blue, Eyðun Johannesen, er spentur at sleppa at vísa síni kynstur á útgávukonsertini.

- Tað verður blues, bæðir sum tað eigur vera og nýggjari blues tónleikur. Mann kann siga, at tað verður blues frá rótunum og frameftir, sigur hann.

### Tað primera at spæla

Crawling Blue vil koyra tað allan vegin, og helst taka alla verðina um møguligt. Bluesumhvørvið í Føroyum er ikki nakað at reypa av, men uttanlands er tað stórt, og skulu teir sjálvir meta um, verða teir nógvar ferðir betri móttiknir aðra staðni enn í Føroyum.

- Jazzur og blues eru á ein hátt tryggari sjangra at arbeiða við. Tað er altíð onkur klubbi, sum vil hava blues tónleik, og tað er ein trúgvur skarði, sum fylgir blues sjangruni, heldur Brandur Jacobsen, sum gjøgnum sína tónleikakarrieru hevur drúgvar royndir innan nevniliga blues og jazztónleik.

Um tað er neyðugt, flytir bólkurin av landinum fyri at fokusera uppá tónleikin.

- Eg havi einki ímóti at búgva í einum kufferti, um eg bara sleppi at spæla tónleik, sigur Uni R. Debess erliga.

- Tað er stuttligt at gera eina fløgu, men tað primera er at sleppa at spæla tónleikin.

# Linda kemur heim at vitja

**Sunnudagin kemur Linda Andrews til Føroya at heilsa upp á sínar føroysku fjeppparar. Hon verður gestur á Rás2, og fólk kunnu eisini koma í Miðlahúsið at heilsa upp á Lindu**

X FACTOR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Nú leitar songkvinnan Linda Andrews heim til Føroya at fáa luft og heilsa upp á sínar føroysku fjepparar. Linda hevur verið í sonnum ódnarveðri í Danmark seinastu vikuna, og fríggjakvøldið skal hon aftur verða við í X Factor sangkappingini.

Sunnudagin vitjar Linda Andrews í Miðlahúsinum í Havn, og har fáa fólk møguleikan at heilsa upp á hana og at fáa autograf.

Rás2 fer at hita upp til tiltakið við stórari samrøðu við Lindu Andrews og onnur, og Rás2 sendir eisini beinleiðis frá tiltakinum í Miðlahúsinum.

### Donsk pressa við á ferðini

Sunnudagin millum klokkan 15.00 og 17.00 er Linda Andrews við í útvarpssending hjá Rás2, og millum kl. 17.00 og 18.00 kunnu fólk koma í Miðlahúsið at heilsa upp á Lindu. Møguleiki verður eisini at fáa autograf frá henni.

– Vit eru sera fegin um, at Linda leggur leiðina heim at vitja okkum, nú føroyingar fylgja so væl við, hvussu hon klárar seg í X Factor, sigur Jonhard Hammer, stjóri á Rás2.

– Hetta er eisini eitt gott høvi hjá føroyingum at gera vart við seg, tí í fylginum við Lindu verða eisini nógv donsku pressufólk, sum fara at dekka vitjanina í Føroyum, sigur hann.

Millum annað fara DR, Ekstrablaðið og Se & Hør at fylgja Lindu á ferðini til Føroya.

### Linda í ódnarveðri

Seinastu vikuna hevur føroyska songkvinnan Linda Andrews av álvara verið í brennideplinum í Danmark, eftir at umstríddi dómarin Thomas Blachman legði eftir henni. Blachmann segði, at hann vildi hava Lindu Andrews úr kappingini beinanvegin, tí hann orkaði hana ikki meira.

Síðani hevur Blachmann biðið um umbering fyri sínar viðmerkingar, og í annaðkvøld skal Linda standa næstu royndina í X Factor kappingini.

Fimm sangarar eru eftir í X Factor, og eftir kappingina fríggjakvøldið verða tey bara fýra.

Líkamikið hvussu tað gongur hjá Lindu fríggjakvøldið, verður hon gestur í Miðlahúsinum sunnudagin.



*Linda Andrews vitjar í Miðlahúsinum seinnapartin sunnudagin. Fólk eru vælkomin inn á gólvið at heilsa upp á hana millum klokkan 17 og 18*
*Mynd: DR*